

# LEIÐARI TIL DEBITORBÓKHALDIÐ

**Elfelagið SEV sóknast eftir fólki at leiða debitorbókhald felagsins. Eftir føroyskum viðurskiftum er talan um stórt bókhald við 23.000 kundum, og søla okkara í fjør var um 238 mió. kr. umframt mvg.**

## UPPGÁVUR TÍNAR VERA MILLUM AÐRAR AT:

- Standa á odda fyri debitorstýringini
- Hava um hendi edv-skipanina, ið stýrir kundaviðurskiftum okkara
- Skipa fyri, at uppgerðir og rokningar verða sendar kundunum
- Samskipa kundatænastuna viðvíkjandi fyrispurningum og fíggjarmálum

## TÍNIR FØRLEIKAR:

Vit rokna við, at tú hevur hóskandi útbúgving og royndir í bókhaldi og debitorstýring, og at tú hevur góðan kunnleika til bókhaldsforrit. SEV nýtir serliga debitorskipan, sum fleiri donsk elfeløg nýta, og tú fært neyðuga upplæring í hesum forriti. Vit vænta eisini, at tú hevur góð samstarvsevni og dugir at samskipa arbeiðið við kundatænastuni innan debitorstýring. Kundatænastan verður í dag veitt á øllum skrivstovum okkara, t.e. í Klaksvík, Vestmanna, Tórshavn og í Vági.

## LØN OG SETANARTREYTIR:

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum verða løntir eftir 8. lønarflokki í sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið. Starvið hevur tilvísing til deildarstjóran fyri Fyrisitingardeildina.

Hevur tú spurningar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við John P. Danielsen, deildarstjóra, á 34 68 00 ella á jpd@sev.fo.

## UMSÓKNARFREISTIN ER MIKUDAGIN, 31. OKTOBER 2007.

Send umsókn tína til: Elfelagið SEV
Landavegur 92, Postsmoga 319, FO-110 Tórshavn

SEV

REPROZ



# STARVSFÓLK TIL KRÁSADEILDINA Í MIKLAGARÐI

Søkt verður fólki M/K til at arbeiða 25 tímar um vikuna í krásadeildini í Miklagarði, at byrja 12. november 2007. Løn eftir avtalu. Ert tú framúr kundavinarlig/ur, opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði, við nógvum starvsfólkum, í einum nógv vitjaðum umhvørvi.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

## SEND UMSÓKNINA TIL:

Slaktarin, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn
ella send ein teldupost til jorgen@jyde.dk
Tú kanst eisini ringja 31 52 62 og spyrja eftir Eydnu.

MIKLAGARÐUR

Dogg